## Kunning um avtalu millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið at flyta dagrøktarar millum sáttmálaøki

Hugsandi um serstøku støðuna í Føroyum orsakað av corona virusinum hava Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið gjørt avtalu um, at tað skal verða møguligt at flyta dagrøktarar at arbeiða á eldraøkinum. Avtalan fevnir um dagrøktarar, sum av arbeiðsgevaranum eru sendir heim grundað á arbeiðsmangul. Talan er um starvsfólk, sum skulu verða tøk at heita á, tá tørvur er á tí.

Í dagrøktunum eru sett tiltøk í verk, sum skulu forða fyri, at corona virusi breiðir seg óneyðuga skjótt. Hesi tiltøk hava við sær, at grundarlag ikki er fyri at hava allar dagrøktarar til arbeiðis.

Á eldraøkinum er støðan øðrvísi, har arbeiða øll við fullari kraft, fastlønt og tímalønt. Tiltøk eru/verða eisini sett í verk, har roynt verður at forða fyri ella minka um smittuvandan av corona virusinum. Talan er í fleiri førum um tiltøk, ið hava við sær, at neyðugt er við fleiri starvsfólkum á økinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið eru samd um, at kommunur og eldrasamstørvini í avtalu við einstakar dagrøktarar kunnu flyta hesar at arbeiða á eldraøkinum. Soleiðis kunnu dagrøktarar verða settir í vaktir á eldraøkinum samsvarandi teimum ætlanum, sum eldraøkið hevur. Atlit skulu kortini takast til viðurskifti hjá einstaka starvsfólkinum.

Viðv. lønini hjá starvsfólkunum er útgangsstøðið, at dagrøktarar varðveita tí løn, sum teir hava rætt til sambært galdandi sáttmála partanna millum. Lønin fyri møguligt meirarbeiði/yvirtíð, samsýningin fyri ólagaligar arbeiðstíðir o.a. verður at fylgja galdandi høvuðssáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

Avtalan verður endurskoðað leypandi, og fellur burtur av sær sjálvum 15. Apríl 2020, men kann leingjast eftir nærri avtalu partanna millum.

Tórshavn tann 25. mars 2020

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið